**Námsætlan**

# Lívfrøði

**7. – 9. floksstig**

**Galdandi frá 1. august 2026**

## Viðmerkingar

- Partar av innihaldinum í áður galdandi námsætlanum eru fluttir í støðisnámsætlanina og aðrir partar í tilhoyrandi leiðbeiningar.

## Tilhoyrandi skjøl

- Støðisnámsætlan
- Leiðbeining – lívfrøði 7.-9. floksstig

# 1. Samleiki

Lívfrøði fevnir um alt livandi, heilt frá lívfrøðiligum tilgongdum á mýlastøði í kyknuni til lívfrøðiliga samspælið í lívhválvinum øllum. Lívfrøði byggir á kanningar og eygleiðingar, bæði í royndarstovu og úti í náttúruni, ið geva innlit í tað fjølbroytnið, sum er í lívfrøðiligum skipanum. Vitan og fatan í lívfrøði eru soleiðis grundaðar á strembanina eftir at finna fram til, hvussu natúrlig viðurskifti eru skipað, og á náttúruvísindaligar arbeiðshættir.

Lívfrøði sum lærugrein gevur næmingunum innlit í, hvussu livandi verur virka, mennast og samspæla við sítt umhvørvi, og leggur støði undir førleikan at duga at brúka hesa vitan til at skilja nýggj fyribrigdi og fáa nýggja vitan til vega. Samstundis veitir lívfrøði næmingunum fakliga vitan um burðardygga umsiting av náttúrutilfeinginum og leggur lunnar undir støðutakan og ábyrgd í sambandi við etiskar, heilsuligar og samfelagsligar spurningar.

# 2. Endamál

Undirvísingin í lívfrøði hevur til endamáls, at næmingarnir:

- fáa stimbrað síni evni at nýta forvitni og áhuga fyri lívfrøðiligum samanhangum og á tann hátt fáa hug til at læra meira
- fáa fatan av, hvussu lívfrøði er grundleggjandi læran um alt livandi, og hvussu ymisku skipanirnar í náttúruni og í kroppinum virka saman
- ogna sær vitan um kropp og heilsu, vistfrøðiligar skipanir, smáverulívfrøði, menningarlæru og náttúrutilfeingi við denti á lívfrøðilig hugtøk og týdningarmiklar samanhangir
- menna førleikar at leita og rannsaka í lívfrøðiligum viðurskiftum við støði í bæði ástøði og verkligum royndum
- ogna sær lívfrøðiligar arbeiðis- og hugsanarhættir
- fáa førleikar at nýta lívfrøðiliga vitan í sambandi við gerandislig og samfelagslig viðurskifti
- fáa kunnleika um, hvussu lívfrøði er partur av mentan okkara og fatanini av heiminum
- síggja týdningin av, at náttúran og náttúruríkidømið verða umsitin á skynsaman og burðardyggan hátt.

Lestrarfyrireikandi endamálið er, at næmingarnir við ymiskum royndum og arbeiðsháttum megna at fara í dýpdina fakliga, at tey kritiskt evna at útvega ymiskar upplýsingar, skilja samanspælið millum tað ástøðiliga og tað verkliga við at leggja til ættis og gera royndir, bæði úti í náttúruni og inni í royndarhølinum. Hetta fevnir eisini um at megna at greina, skjalfesta og miðla royndarúrslit.

# 3. Kjarnaøki

## 9. floksstig - kjarnaøki

Lívfrøði á 9. floksstigi hevur fýra ymisk kjarnaøki. Økini umskarast og virka fyri ein stóran part saman í undirvísingini.

- Náttúran
- Kyknan
- Kroppurin
- Umhvørvi

### Náttúran

Kjarnaøkið *náttúran* fevnir m.a. um djóralæru og plantulæru. Undirvíst verður í, hvussu livandi verur ávirka náttúruna, og hvussu náttúran ávirkar livandi verurnar. Kjarnaøkið fevnir um at kenna djór, plantur og fyritreytir fyri, at tey liva, og hvat eyðmerkir økið, tey liva í. Økið fevnir eisini um smáverulæru, her ímillum niðurbrótarar og bakteriur, virus og soppar.

Vistfrøði á sjógvi og á landi er eisini fevnt av hesum øki. Undirvíst verður í fotosyntesu og anding, í høvuðsheitum at lýsa eina vistskipan, í føðiketum, føðineti, føðipyramiduni, BFF og NFF. Hugt verður eisini at livnum og ólivnum umstøðum.

### Kyknan

Kjarnaøkið *kyknan* snýr seg um kyknulæru og lívevnafrøði. Undirvíst verður í ymiskum kyknusløgum, kyknugøgnum og teimum tilgongdum, sum fara fram inni í kyknuni, so sum meiosa og mitosa. Økið fevnir eisini um fotosyntesu og respiratión, kjarnuloysingar og virus.

Gøgn og virki hjá djórakyknum og plantukyknum eru partar av kjarnaøkinum, har dentur verður lagdur á munin millum hesi kyknusløg. Undirvíst verður í ílegum, og hvussu tær eru grundarlag undir arvalæru og menningarlæru. Í hesum sambandi verður hugt at arvi og genetiskum eginleikum í føroyskum samanhangi. Økið fevnir eisini um lívtøknifrøði, har næmingarnir fáa innlit í, hvussu vit kunnu nýta vitan um kyknur og ílegur í praktiskum og vísindaligum høpi.

### Kroppurin

Kjarnaøkið *kroppurin* fevnir um fysiologi, kropsbygnað og lívevnafrøði. Undirvíst verður í, hvussu livandi skipanir virka, og bygnaðinum hjá ymsu lívgøgnunum. Økið fevnir eisini um nøring og kynslív, m.a. fyribyrging og kynssjúkur, og heilsukunnleika, har dentur verður lagdur á týdningin

av kosti og rørslu, og ávirkanina, rúsdrekka og rúsevni hava á kroppin. Undirvíst verður eisini í kynsbúning.

### Umhvørvið

Kjarnaøkið *umhvørvið* fevnir um dálking av umhvørvinum, bæði á landi og sjógvi, og umhvørvisvernd. Hugt verður at mannaávirkan á umhvørvið umframt náttúruávirkan á umhvørvið, ið vit ikki kunnu ávirka. Veðurlagsbroytingar er eisini týðandi evni, har ljós verður varpað á margfeldi og burðardygga nýtslu av tilfeingi.

# 4. Faklig førleikamál

Í fólkaskúlanum hevur lærugreinin lívfrøði endalig mál fyri 9. floksstig.

## 9. floksstig – faklig førleikamál

Málið við undirvísingini er, at næmingurin við støði í kjarnaøkjunum dugir:

- at seta spurningar og gera hypotesur um lívfrøðilig fyribrigdi og savna saman dátur til tess at finna svar
- at leita eftir lívfrøðiligum upplýsingum og meta um tær
- at leggja til rættis, gera og eftirmeta royndir í lívfrøði
- at nýta útgerð til royndir í náttúruni og royndarstovu
- at greina og umrøða dátur, herímillum keldur til skeivleikar og óvissur
- at nýta og gera modell til at greiða frá lívfrøðiligum fyribrigdum og meta um styrkir og veikleikar við modellunum
- at nýta yrkishugtøk um lívfrøðilig fyribrigdi og geva samanhangandi fakligar frágreiðingar
- at seta lívfrøði í frásjón, m.a. í føroyskan samanhang
- kritiskt at meta um, hvussu lívfrøði og náttúra verða nýtt, bæði staðbundið og í alheimshøpi
- við støði í fakligari vitan at taka støðu til og seta í frásjón samfelagsligar, umhvørvisligar og etiskar spurningar við lívfrøðiligum innihaldi.

# 5. Próvtøka

Næmingarnir fara til endaliga próvtøku á 9. floksstigi í fólkaskúlanum.

## 9. floksstig – próvtøka

### Próvtøkuháttur á 9. floksstigi

Hildin verður ein munnlig próvtøka.

### Munnlig próvtøka á 9. floksstigi

Munnliga próvtøkan tekur støði í próvtøkuspurningi, sum fevnir um bæði ástøði og verkligt arbeiði úr undirvísingini. Próvtakararnir fara upp í bólki við 2-3 í hvørjum. Í teimum førum tað verður mett skynsamast, kunnu próvtakarar fara upp einsæris.

Tól, útgerð og tilfar frá undirvísingini kunnu verða nýtt. Próvtøkuspurningurin skal geva próvtakarunum høvi at fara fakliga í dýpdina og seta í frásjón. Fylgiskjøl kunnu verða nýtt. Próvtøkuspurningarnir skulu í síni heild fevna um kjarnaøkini og fakligu førleikamálini. Próvtakararnir trekkja próvtøkuspurning og tilhoyrandi fylgiskjøl, tá ið próvtøkan byrjar.

Próvhoyrarin tosar við próvtakararnar um verkliga arbeiðið og tilhoyrandi ástøði, ímeðan arbeitt verður við givna próvtøkuspurningi. Til endans taka próvtakararnir samanum. Próvtakararnir verða dømdir einsæris.

Próvhoyringin varir 1½ tíma, íroknað útflýggjan av tilfari, leiðbeining og próvdøming.

### Dømingargrundarlag

Dømingin er ein meting av, í hvønn mun avrikið hjá næminginum lýkur fakligu førleikamálini í lærugreinini. Dentur verður serliga lagdur á, at næmingurin dugir:

- at nýta viðkomandi fakliga vitan og yrkisorð til at greiða frá og útgreina innihaldið í próvtøkutilfarinum
- at lýsa verkliga arbeiðið og seta tað í samband við viðkomandi lívfrøðiliga vitan
- at greina úrslit, geva samanhangandi fakligar frágreiðingar og taka lut í fakligari samrøðu
- at seta sína lívfrøðiligu vitan í frásjón.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avrikinum hjá næminginum.